

# Egi Dam leikstjórna í Klaksvík

Tá Egi Dam er leysur av sínum arbeiði við leikinum *Móðir Sjeystjørna* fer hann til Klaksvíkar, har næsta uppgávan hjá honum bíðar.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer í næstum undir at venja ein franskan skemtileik, og hendan leikin skal Egi seta upp.

Leikurin verður í løtuni umsettur, og enn hevur hann ikki fingið føroyskt heitið. Á donskum verður hann róptur Forårskuller.

Seks leikarar eru við í leikinum, sum væntandi verður frumsýndur eina ferð í mars mánaði.

– Skemtileikir vísa seg at rigga væl í Klaksvík, og tað er ein orsøk til, at vit fara at spæla hendan leik, sigur Adelborg Linklett.

# Lloyd Webber keypir leikhús

Lord Lloyd Webber, sum fyrra plagdi at rópa seg Andrew Lloyd Webber, hevur brúkt okkurt um 85 milliónir pund (tað er umleið ein milliard í okkara pengum) upp á leikhús í London.

Lloyd Webber vann nógvar pengar, tá hann skrivaði sangleikirnar »Cats« og »Starlight Express«, og seinni skrivaði hann fleiri kend verk, millum annað Jesus Christ Superstar.



Lloyd Webber sigur, at hann ætlar at halda pengamonnum burtur frá leikhúsunum í London. Hann hevur stíðst við amerikumenn um at keypa leikhúsini í London, og tað hevur hann gjørt fyri at varðveita traditiónirnar í býnum, sigur hann.

Tað verður mett, at Lloyd Webber er góður fyir einar 350 milliónir pund.

# Selja nýru til sømdarløn

Fleiri enn 500 fólk í iranska býnum Mashhad siga, at tey eru til reiðar at selja síni nýru fyri at fáa pengar til sømdarløn, sum skal latast tí persóni, sum ger enda á Salman Rushdie.

Bretski rithøvundurin hevur havt ein islamiskan deyðadóm hangandi yvir høvdið, síðani hann útgav bókina »Satanisku ørindini« í 1989. Tað var táverandi leiðarin í Iran, ayatollah Khomeini, sum útskrivaði eina sonevnda fatwa.

Bólkurin, sum stendur aftanfyri nýggjasta tiltakið, ætlar at taka internetið í brúk fyri at finna fólk kring allan heimin, sum vilja selja onkran part av sær sjálvum til frama fyri sømdarlønina.

# Grønlendskt læknatrot

Skal heilsuverkið í Grønlandi halda støðið, verður neyðugt at miðsavna tað og at gera meira brúk av teleútgerð.

Hetta sigur Henning Sloth Pedersen, sum er lækni í Nuuk.

– Tað er ógjørligt at skaffa læknar og sjúkrasystrar til øll tey 17 heilsuøkini, sigur hann.

– Tí mugu vit brúka nýmótans tøkni, tá vit skulu viðgera fólk á teimum smáu plássunum kring hetta risastóra land.

Sjey býir eru longu knýttir í eina skipan við televiðgerð, har samband er bæði við sjúkrahúsið í Nuuk og sjúkrahús í Danmark.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Fri. 14. januar 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** kirstin.didriksen@svenska.gu.se
**Reply to:** kirstin.didriksen@svenska.gu.se

TELDU-POSTURIN

# Einki vanligt árskifti

22. september, 100 dagar fyri áraskiftið, byrjaði niðurteljingin til túsundáraskiftið. Kommunan hevði keypt 12 gamlar ljóskastarar frá herinum, ið hvør lýsti 6000 watt. Ljósstrálurnar myndaðu eitt tímaglas í kvøldarmyrkrunum og vóru tendraðar hvørt kvøld fram til midnátt. Ljósspælið sást um allan býn og var sera vakurt á at síggja.

Á hvørjum nýggjársaftan klokkan fimm seinnapart hevur GøteborgsPosten, ella GP sum vit siga her, eitt stórt nýggjárshald í havnini við fýrverki. Til hetta árskiftið var serliga nógv gjørt burtur úr, og munandi fleiri enn vanligt høvdu leitað sær inn til býin at síggja fýrverkið.

Kommunan hevði sett sær tað mál, at eingin skuldi nýtast at sita einsamøll ella einsamallur hetta árskiftið, og øll skuldu hava høvi at síggja partar av nýggjárshaldinum, uttan mun til hvar tey búðu, og uttan mun til teirra heilsu. Alt kvøldið var nýggjárshald við fýrverki hildið runt í teimum ymisku býarpartunum, og haldið endaði á Gøtaplássinum við ymiskum undirhaldi.

10 minuttir í 12 til 10 minuttir yvir 12 bleiv so tað gamla árið, øldin, túsundárið skotið út, og tað nýggja árið, øldin og nýggja túsundárið skotið inn við pomp og pragt. Yvir 100.000 fólk vóru komin sær inn á Avenyina, ið endar uppi á Gøtaplássinum. Tað var sum á tjúkkastu ólavsøku. Fólk vóru flest øll veitsluklødd við sjampanjuglasi í hond. Hýrurin var einastandandi og milt sagt vibrerandi. Gleði og ovfarakáti kendi einki mark hesa løtu. Tá klokkan sló 12 kom nærum andakt yvir fólk. Tað gjørdist púra friður eitt stutt bil, síðan brúsaði gleðin fram aftur, enn sterkari enn áður, fólk hálsfevndust, skálaðu í sjampanju og ynsktu hvør øðrum gott nýggjár.

Hetta var einki vanligt árskifti, men eitt túsundáraskifti, har bæði vit menniskjur og jørðin løgdu Fiskaaldurin aftur um okkum og bóðu Vatnberaaldrinum vælkomnum. Í jarðarinnar horskopi er hvørt tekn ráðandi í 2000 ár. Fiskaaldurin var millum annað merktur av tí kensluliga, skapandi, milda og blíða, men eisini av líðing og egoistiskum kenslum. Vatnberin er millum annað merktur av teldufrøði og háteknologi, globalum samstarvi, ansni fyri umhvørvinum og humanum viðurskiftum, har sjálvútvikling, meditation og trivnaður stendur í hásæti. Ávirkanin frá vatnberinum byrjaði av álvara at merkjast í 1960´unum.

Nógvir spádómar hava verið um 90´ini og serliga 1999. Kendasti spámaðurin man vera Nostradamus frá 1500 - talinum, sum millum annað tosar um ein 3. Heimsbardaga og um ein yvirgangskropp av einum konga í 1999. Bæði Nostradamus og onnur við honum tosa um vatnflóðir, jarðskjálvta, ódnir, veðurlagsbroytingar, ólukkur, herviligar umfarssjúkur og kríggj sum eyðkenni fyri 90´ini og tíðina um túsundáraskiftið. Hyggja við aftur at 90´unum, so vóru 90´ini júst merkt av hesum eyðkennum, og 1999 mundi helst vera svárasta árið.

Danin Asger Lorentsen man vera ein av teimum, ið serliga hevur sett seg inn í tær ymisku framtíðar forsøgnurnar. Hann hevur millum annað skrivað eina bókarøð upp á 4 bind, ið nevnist »Menneskehedens gyldne fremtid«. Í teirri fyrstu bókini »Jorden skal lyse« (Borgens Forlag, 1996) greiður hann frá tí útviklingi, sum planetin jørðin, og vit sum eru á jørðini, eru inni í andaliga sæð.

Ein sera áhugaverd bók, ið gevur okkum eina fatan av, hví tað hendir sum hendir. Hann sær jørðina sum eina livandi veru, ið hevur fingið nokk av allari dálking, kemiskari sum kensluligari. Jørðin hevur fingið nokk av okkara egoismu, líkasælu, havusjúku, maktgirnd, matrialiteti, øvundsjúku, óumhugsni o.s.fr., o.s.fr.

Hetta vísur hon okkum við at reinsa seg fyri negativitet, og tað ger hon m.a. gjøgnum regnið, jarðsjálvta, ólukkur og líðing. Hon ynskir, at vit skulu vakna og reinsa okkum sjálvi og hjálpa henni at umskapa allan tann negativitet og dálking sum hevur verið gjøgnum tíðirnar. Jú skjótari vit klára at hjálpa okkum sjálvi og jørðini, jú lættari gera vit tað fyri okkum øll.

**Kirstin Didriksen,
Gøteborg**





## FØÐINGAR

26. desember fingu Ingun Eidesgaard og Hermann Mortensen í Esbjerg, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3820 gr.

30. desember fingu Rannvá Biskupstø og Ian Leyni, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

5. januar fingu Dagmar og Heri Højsted, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3000 gr.

7. januar fingu Lis og Jóhan Sørensen, Skála, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3300 gr.

7. januar fingu Elin Hentze í Stórustovu og René Dahl Olesen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3700 gr.

8. januar fingu Sólgerð og Signar á Reynatrøð, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3300 gr.

10. januar fingu Gunnleyg og Jan Jacobsen, Oyrarbakki, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3850 gr.

11. januar fingu Eivi Jacobsen og Kári Finnsson, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3400 gr.

11. januar fingu Hanna og Tróndur við Á, Tórshavn, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2600 gr.

11. januar fingu Anna Mørkøre og Søren Bertholdsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4050 gr.

12. januar fingu Anna Sofía og Elmar R. Fjallheim, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

13. januar fingu Jenny Askham og Stephan Sønderskov, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3510 gr.



## ANDLÁT

6. januar:
**Hans Jacobsen,** Fuglafjørður, 69 ár
**Steintór Durhus,** Vestmanna, 96 ár
7. januar:
**Alice Gaard,** Klaksvík, 61 ár
**Hans Hendrik Strøm,** Trongisvágur, 73 ár
**Anna Sigrid Ísheim,** Tórshavn, fødd Rasmussen av Kirkju, 87 ár
8. januar:
**Theodor Egholm,** Streymnes, 86 ár
**Anna Elisabeth Norðbø,** Sandur, 91 ár
**Laila Elfrida Nielsen,** ættað úr Frederiksberg, 55 ár
9. januar:
**Eliesar Olsen,** Skála, 65 ár
**Karolina Durhuus,** úr Trøðum á Sandi, 87 ár
**Sjúrður Nolsø,** Nólsoy, 69 ár
**Símun Andras Andreasen,** Strendur, 42 ár
10. januar:
**Hermann Jacobsen,** ættaður úr Víkarbyrgi, búsitandi í Havn, 72 ár
11. januar:
**Ella Hansen,** Runavík, 80 ár
**Joen Jacob Kjartan Johansen,** Sørvágur, 69 ár
12. januar:
**Hansina Debes,** Tórshavn, 86 ár

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 15. jan.:* Hálvdan Simonsen, tlf. 448016
*Sunnudagin 16. jan.:* Pól Johs. í Horni, tlf. 444038

**Norðoyggjar:**
Sigvald Kristiansen, tlf. 455045

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

### Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 2. sunnudag eftir trettanda
*Havnar kirkja:* kl. 11.00, Sonja Klein
*Sørvágur:* kl. 12.00, altarg., David Johannesen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech
*Haldórsvík:* kl. 12.00, Martin R. Jacobsen
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10.00,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Meinhard Bjartalíð
*Vesturkirkjan:* kl. 11.00, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11.00, Bergur D. Joensen
*Funningur:* kl. 12.00, messa,
*Gjógv:* kl. 17.00, messa, Emil Olsen
*Leirvík:* kl. 12.00, altarg., Peter O. K. Olofson
*Kvívík:* kl. 12.00, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 12.00, altarg., Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11.00, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Haraldssund:* kl. 12.00, altarg., Hans Eiler Hammer
*Húsavík:* kl. 12.00, altarg., Jákup R. Hansen
*Hov:* kl. 12.00, altarg., Elsa Funding
*Tvøroyri:* Petur Martin Rasmussen

### Frá Ebenezer
Sunnudag kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21.00 útimøti. Mánadag kl. 20.00 bønarmøti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkomu
Sunnudag morgunmøti kl. 11. Kl. 12.15. Sunnudagsskúl. Kl. 18 Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli og sunnukvøldið kl. 19.00 Møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Eingi vikuskiftismøti vegna samkomulegu í Nesvík. Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn og kl. 20.00 samkomubønarmøti.

### Meinigheitshúsið í Havn
Hvørt kvøld kl. 20 í hesi vikuni er bønarmøti í samband við alheims bønarvikuna. Á møtinum sunnudagin kl. 18 talar Sverri Steinhólm. Missiónsvikan verður í døgunum 23.-30. januar. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14.00 í Hoyvíkar skúla er sunnudagsskúli, kl. 17.30 er bøn og kl. 18.00 møti har Annika við Skipá talar. Verið øll hjartaliga vælkomin. Vit eru við í tiltakinum frá »Minus til Pluss«.

### Frelsunarherurin Tórshavn
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18.00 Møti.

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17.00 møti og sunnudagsskúli. Leigh og Jan Hjaltalin luttaka við talu, sangi og vitnisburði. Øll eru vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 17. jan kl. 15.00 í KFUK. Eldrasamkoman v/ Carl Weihe, evni: Nøkur orð um eina trúbótarhetju.
Týsdagin 18. kl. 16.00-17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Hvalvíkar Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 18.00 Møti v/ Torbjørn Láadal o.a. Ungdómsmøti kl. 20.00. Missiónsvikan byrjar mikudagin 19.1. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Missiónsvikan heldur fram við møti í kvøld kl. 20, Regin Høgnesen talar. Magni Christiansen, Niels Juel, Jákup, Gullak og Jónhilda syngja. Sunnudagin verður familjumøti kl. 15.00 v/ Annelisu Berthelsen og barnakór av Strondum syngur. Kl. 19.00 verður møti v/ Niels Jacob Neilsen, trúboðara og húsakórið syngur.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús, sunnudagin kl. 17 Møti við Rasmus Frederiksberg og Osbjørn Joensen. Barnamøti kl. 17.

### Saron, Viðareiði
Møtirøðin heldur fram í kvøld kl. 20.00 og sunnudagin kl. 18.00, Osvald Kjærbo talar.

### Missiónshúsið, Vestmanna
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 við Ingolf Johannesen úr Sandavági og menn úr Sandavági syngja. Sunnudagin kl. 12.00 guðstænasta við Una Næs, presti, kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18.00 møti við talu og sangi úr Vík og Tjørnuvík.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14. Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við John og Tove Hammer. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Skúlahøllin í Trongisvági
Møti undir heitinum »Eitt í Kristusi« verða fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin, allar dagarnar kl. 20.00. Luttøka við ymiskum talarum og sangarum.

### Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

### Betel, Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11.00, Sunnudagsskúli kl. 13.30 og Evangel. fundur kl. 18.00.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.00.
Ónsdagin: Uppbygg. fundur kl. 20.00.

### Føroysku gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

### Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

### Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

### Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

### Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.00.

## Prógv

**Jóhan H.S. Mouritsen, Hoyvík, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læruplásss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja.**

**Heini Hildebrandsson Midjord, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læripláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja.**

## Gullbrúdleyp

**Fríggjadagin 28. januar kunnu hjúnini Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, halda gullbrúdleyp. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygarkvøldið 29. januar kl. 19.00.**

**Tey, ið ynskja at gleða gullbrúðarparið við at koma, kunnu siga frá á tlf. 444092 og 444260 áðrenn 22. januar.**

## Brúdleyp

**Í gjár giftust á Eiði, Dorit Jacobsen og Olaf Th. Kruse.**

**Leygardagin 29. januar kl. 14.00 giftast í Ebenezer Sunfríð Helgadóttir í Gong og Benjamin Gaasedal, bæði úr Tórshavn.**

**Vælkomst verður í B36 húsinum kl. 19.00. Vinaliga sigið frá á tlf. 316195, 320344 ella 210220 áðrenn 22. januar.**